# Útlit fyri arbeiðsfriði á almenna arbeiðsmarknaðinum

**Møguleiki er nú fyri, at almenni arbeiðsmarknaðurin veruliga kann gerast friðarligari. Tað er greitt, eftir at almennu arbeiðsgevararnir og Starvsmannafelagið hava gjørt semju um ein fýra ára sáttmála við einum rímiligum lønarkarmi**

TÍÐINDASKRIV



*Sáttmálin verður hugdur ígjøgnum á Hotel Føroyum í dag*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Um middagsleitið í dag sendu Fíggjarmálaráðið, Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Elfelagið SEV soljóðandi tíðindaskriv út:

"Samráðingar í knappliga 100 tímar hava nú givið eina semju millum Fíggjarmálaráðið, Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Elfelagið SEV øðrumegin og Starvsmannafelagið hinumegin.

– Vit byrja nú veruliga at síggja myndina av einum friðarligari føroyskum arbeiðsmarknaði. Saman við fimm ára semjuni við sjúkrarøktarfrøðingarnar er semjan við Starvsmannafelagið við til at skapa frið á arbeiðsmarknaðinum. Allir partar fáa nú stundir og frið at arbeiða við øðrum týðandi tættum enn júst lønarspurningum. Eitt nú kunnu vit brúka orku til førleikamenning og nýggja lønarskipan, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, ið vegna Fíggjarmálaráðið undirskrivaði semjuna við Starvsmannafelagið fyrrapartin í dag.

Semjan ber í sær ein fýra ára sáttmála, ið fevnir um tíðarskeiðið frá 1. oktober 2006 til 1. oktober 2010. Hetta er eitt munandi longri tíðarskeið enn í undanfarnum sáttmálum, ið hava fevnt um eitt ella tvey ár.

Fyrsta árið er karmurin 1,7 prosent, og tey fylgjandi árini er hækkingin 3 prosent árliga. Arbeiðsgevararnir meta hækkingina vera rímiliga, tí hon skuldi ikki nervað føroyska kappingarførið. Harumframt eru umflokkingar gjørdar.

Somuleiðis eru broytingar gjørdar, soleiðis at praktikkvegleiðarar kunnu fáa eina viðbót fyri at vegleiða praktikantum á almennum arbeiðsplássum.

Eitt treytað protokollat er partur av semjuni við Starvsmannafelagið. Í stuttum merkir protokollatið, at Fíggjarmálaráðið saman við fakfeløgunum vil finna fram til almennar reglur um, hvussu almenn størv skulu verða flokkað og lønt."

# Gevur høvi at røkja aðrar uppgávur

**Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, fegnast um sáttmálan, hann fyrr í dag undirskrivaði á Hotel Føroyum. – Tað liggja nógv góð virðir í sáttmálanum, sum ikki endurspegla prosentini, vit hava fingið, sigur hann**

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Gunnleivur Dalsgarð fegnast serliga um, at tað eydnaðist at fáa sáttmála í lag um øll fýra økini*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Loksins eydnaðist tað at fáa semju í lag millum Starvsmannafelagið og almennu arbeiðsgevararnar. Beint fyri evstamark okkara fingu vit orðið á Gunnleiv Dalsgarð, formann í Starvsmannafelagnum, og vit spurdu hann, um hann nú er ein glaður maður.

– Eg eri glaður á tann hátt, at vit nú fáa ein sáttmála fyri øll fýra økini, greiðir Gunnleivur Dalsgarð frá.

Hvat er tú fegnast um við sáttmálanum?

– Tað eru nógv ting, men fyrst og fremst at vit spældu út, at sáttmálin skuldi vera fyri øll økini og fingu tað, sigur Gunnleivur Dalsgarð og leggur so aftrat:

– Men har eru nógv góð virðir í sáttmálanum, sum ikki endurspegla prosentini, vit hava fingið, sigur hann.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum vísir á, longdin á sáttmálanum ger, at tey nú fáa høvi til røkja fleiri onnur forsømd øki, sum hann málber seg.

– Øll orka er brúkt til sáttmálarnar, men sum fakfelag meta vit eisini vit hava aðrar uppgávur at røkja, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Kent Christensen:

# - Ein møguleiki eg ikki kundi lata fara



**Kent Christensen sigur, at við keypinum av eini fyritøku fylgja vanliga tær skyldur við, sum felagið hevur. - Flogfelag Føroya er ein væl rikin fyritøka, og starvsfólkini halda øll fram sum higartil**

FLOGFELAG FØROYA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sølu-og marknaðarstjórin hjá Atlantsflogi seinastu sjey árini, Kent Christensen, hevur saman við øðrum íleggjarum í Vestmanna keypt meginpartin av partabrøvunum í P/F Flogfelag Føroya og Sp/F Flogfelag Føroya.

Teir, sum eru við í keypinum saman við honum, eru Tummas Christophersen, reiðari og Dánjál J. Andreasen, sum er stjóri í Kollafjord Pelagic.

Kent er sjálvur høvuðspartaeigari í keypinum av partabrøvunum í nevndu feløgum.

Sáttmálin verður endaliga undirskrivaður fyrsta dagin, og keypið fevnir um meginpartin av virkseminum hjá Flogfelag Føroya.

## Nógv virksemi

Kent Christensen sigur við Sosialin, at virksemið hjá feløgunum fevnir um Hotel Vágar, kafeteriaog handilsfelagið á flogvøllinum, ferðaskrivstovuna í Havn og helvtina av Rio Bravo eins og helvtina av fyritøkuni, Hertz, sum leigar út bilar.

Høvuðseigarin verður sjálvur stjóri í samlaðu fyritøkuni og fer at hava sæti á høvuðsskrtivstovuni í Gundadali.

- Eg havi sagt meg úr starvi hjá Atlantsflog, men undir slíkum umstøðum avger felagið, um eg kann fara beinanvegin – ella verða tíðina út. Í hesum føri hevur Atlantsflog gjørt av, at eg skal verða verandi í starvinum fram til endan av apríl mánaða, sigur hann.

## Góður møguleiki

Sjálvur heldur Kent Christensen, at starvið sum sølu-og marknaðarleiðari hjá Atlantsflogi er eitt tað besta starvið, tú kanst hugsa tær.

- Men her hevði eg ein møguleika, eg ikki kundi lata fara aftur við borðinum. Tað ber ikki til at ríða á tveimum "hestum" samstundis, og tí havi eg sagt meg úr starvinum hjá Atlantsflogi.

Kent sigur, at við keypinum av eini fyritøku fylgja vanliga tær skyldur við, sum felagið hevur og spurdur, hvussu verður við teimum umleið 40-50 dagsverkunum, sum í løtuni starvast undir feløgunum hjá Flogfelag Føroya, sigur hann:

- Flogfelag Føroya er ein væl rikin fyritøka, og starvsfólkini halda øll fram sum higartil.

## Ein avbjóðing

Kent Christensen sigur, at hann er sera fegin um avtaluna, sum gjørd er millum partarnar, og hann tekur við fullum huga ímóti avbjóðingini, sum bíðar fyri framman.

- Hetta var ein møguleiki, ið eg sum sagt ikki kundi lata fara aftur við, sigur Kent Christensen við Sosialin.